# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

**Føðingar**
30. okt. fingu Malan Mikkelsen og Jørgen Christensen búsitandi í Svøríki eina dóttur. Hon vigaði 3955 gr. og var 53 cm. long.

9. november fingu Birita Kristoffursdóttir Jensen og Jón Sigurd Samuelsen, Tórshavn, ein son. Hann var 50 cm. langur og vigaði 4390 gr.

13. november fingu Laila Utvær og Geir Eliassen, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 58 cm. long og vigaði 4300 gr.

15. november fingu Sunrid Gleðisheygg og Ólavur Nielsen, Syðrugøta, ein son. Hann var 56 cm. langur og vigaði 4250 gr.

17. november fingu Henny á Líknargøtu og Jákup í Stórustovu, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 55 cm. long og vigaði 4200 gr.

18. november fingu Lillian Dam Jacobsen, Tórshavn og Ronni Hansen, Skálafirði, eina dóttur. Hon var 51 cm. long og vigaði 3150 gr.

18. november fingu Súsanna Funding og Rúni Juul, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 3700 gr.

**Brúdleyp**
Mikudagin 14. nov. *giftust* á Ráðhúsinum í Keypmannahavn, Monica Hjelm, Tórshavn og Jan Rasmussen, Runavík.

Leygardagin 24. november giftast Vanja Højgaard, Saltangara og Jørmund Skoradal Saltnes. Vígslan verður í Fríðrikskirkjuni kl. 14. Døgurði verður fyri innbodnun kl. 17.30. Vælkomst verður í sjókafe´ini í Runavík kl. 22. Øll eru hjartaliga vælkomin :)

**Diamantbrúdleyp**
Í dag, 23. nov kunnu hjúnini Hannemia og Jens Juel Sólbjørg halda diamantbrúdleyp. Dagurin verður, um Gud vil, hildin leygardagin í Skálanum frá kl 18, hvar øll, sum vilja gleða okkum eru hjartaliga vælkomin.

**80 ár**
Mánadagin 26. november fyllir Petur Andrew Petersen, fyrrverandi prestur í Keypmannahavn, 80 ár. Móttøka verður í Føroyahúsinum á Vesturbrúgv leygardagin 24. november frá klokkan 14 til 17.

**85 ár**
Leygardagin 24. november verður Christian Christoffersen, Sandavágur 85 ár. Dagurin verður hildin sama dag frá kl. 19.00, heima hjá Elias og Lindu. Øll eru hjartaliga vælkomin.



**80 ár**
Mánadagin 26. novembur verður Petur Højgaard Simonsen 80 ár. Dagurin verður hildin umborð á »Liberty of the Seas« í Karibiska havinum, saman við familjuni.

## Minningarorð um
# Christinu og Johannes Petersen

Í dag, er eitt ár liðið, síðan vit vóru úti í Pálsstovu og hátíðarhild tykkara gullbrúdleypsdag. Nógv vóru komin at heiðra tykkum hetta kvøldið.

Tit riggaðu so væl bæði, tað vóru øll sannførd um. Eitt sera hugnaligt kvøld.

Men lítið vistu vit, at bert 14 dagar seinni skuldi sjúkan hjá ommu gera um seg aftur. Eg, Christina og Beinta vóru farnar í biograf, tá Súsanna ringdi og segði, at abbi hevði ringt og sagt, at omma ikki hevði tað so gott.

Og tvær vikur seinni, 2.jólakvøld, andaðist omma okkara.

Góði abbi. Í januar skuldi tú niður til Danmarkar vegna tína sjúku. Tað var sera hart fyri okkum øll, ikki minst hjá tær. Viðgerðin fór sera illa við tær, og tað var tungt at síggja, hvussu tú viknaði. Men einsamallur var tú ongantíð, vit vóru um teg alla hesa tíðina, bæði í Danmark og heima.

Aftan á eina stutta, men strævna sjúkralegu, andaðist tú tann 22. apríl.

Tað var ein stór mannfjøld, ið fylgdi tykkum báðum, til tykkara seinasta hvíldarstað.

Tað kennist løgið at vita sær, at vit ikki bara kunnu fara inn til tykkum at fáa okkum ein bita, ella biða abba koyra okkum har vit skuldu. Tað gjørdu vit ofta.



Góði babba. Tað hevur verið ógvuliga hart fyri teg at missa bæði mammu og pápa tín við so stuttum millumbili. Tað vóru ikki fýra mánaðir ímillum.

Nú samfelagsmøtini júst hava verið, koma nógv góð minnir fram. Tá vóru vit øll altíð saman til ein góðan náttúrðabita niðri hjá tykkum, áðrenn leiðin gekk niðan aftur í høllina, og tað var altíð líka hugnaligt.

Saknurin er sera stórur, nú tit bæði eru farin.

Við hesum, vilja vit lýsa frið yvir minnini um ommu og abba.

**Birita, Christina, Súsanna og Beinta**

# Jólasøla í Virkni



Eins og undafarin ár skipar Verkhúsið Virkni á Berjabrekku í Havn fyri jólasølu á stovninum. Talan er um hondgjørdar lutir, sum brúkararnir á stovninum sjálvir hava gjørt.

Jólasølan verður frá mikudegnum 28. november til og við sunnudagin 2. desember.

28. og 29. november er opið frá kl.14 – 18, 30. november frá kl. 14 –19, leygardagin 1. desember frá kl. 12 - 18, og sunnudagin 2. desember frá kl. 16 til 20.

*Jólasøla verður á Verkhúsinum Virkni á Berjabrekku í døgunum 28. november til 2. desember*

veitst tú ikki tað?
Sosialurin